MBM-Kjøt veksur

Kjøtdeildin á Eysturoyar Heilsølu er latin aftur. MBM í Hósvík tekur yvir virksemið

HØGNI MOHR

Eysturoyar Heilsøla hevur valt at lata kjøtdeild sína aftur, og lata sláturvirkið í Hósvík taka sær av arbeiðinum í staðin. MBM tekur yvir bæði sjálva framleiðsluna og veitingina til viðskiftafólkið, sum eru handlar kring landið. Leiðslan á MBM væntar, at yvirtøkan sum frálíður fer at økja virksemið í Hósvík eini 10 - 20 prosent.

Fyrrverandi starvsfólk á fyrrverandi kjøtdeildini á Eysturoyar Heilsølu. Frá vinstru: Alberg Gaardlykke, Magnus í Hjøllum og Hjalmar Juul. Mynd: Jens Kr. Vang

Arbeiðsloysi í Danmark metlágt

Sveinur Tróndarson

Arbeiðsloysi í Danmark fellur og fellur. Í nógv ár var arbeiðsloysi sera høgt, men fyri nøkrum árum síðani vendi gongdin, og sum støðan er í løtuni, hevur arbeiðsloysi ikki verið lægri í 26 ár. Tað skrivar danska blaðið Jyllandsposturin.

Tað skal kortini leggjast afturat, at illa ber til at sammeta dagsins tøl við gomul, tí ein stórur partur av teimum, sum eru farin úr arbeiðsloysisskránni nú fáa eftirløn, eru farin í farloyvi, eru »aktiveraði« ella eru sett í gongd á annan hátt.

Hóttandi lønartrýst

Kortini hevur lága arbeiðsloysi fingið búskaparfrøðingarnar at óttast eitt sindur.

Orsøkin er, at um ikki so langa tíð verður farið undir desentralu lønarsamráðingarnar og tá er vandi fyri lønartrýsti.

– Av tí at arbeiðsloysi er so lágt, so er størri vandi fyri einum øktum lønartrýsti. Tí hevði tað komið væl við, um vit nú komu inn í eitt tíðarskeið, har arbeiðsloysi helt uppat at fella. Høvuðsorsøkin til tað er, at tað á týska arbeiðsmarknaðinum eru gjørdir sáttmálar sum hava við sær lítlar lønarhækkingar og tí hevur tað sera stóran týdning fyri danska kappingarføri, at danska arbeiðsmegin ikki setur ov stór krøv. Annars er vandi fyri, at vit missa uppaftur meir av okkara marknaðarparti, sigur búskaparfrøðingurin Klaus Kaiser, frá Jyske Bank, við Jyllandspostin.

Full ferð á

Skrivstovustjórin í BG Bank, Flemming Nielsen, sigur, at framhaldandi fallið í danska arbeiðsloysinum vísir, at ferðin á danska búskapinum als ikki er fallin so nógv, sum fryktandi var fyri. Danir bóru ótta fyri, at útflutningurin fór at fella, men nýggjastu tølini vísa, at hann als ikki er fallin so nógv, sum fryktandi var fyri.

– Útflutningurin er tað, sum aftur setur ferð á búskapin og tað ger okkum eitt sindur bilsin, tí tað er ikki so langt síðani, at eitt ávíst maktaloysi var at síggja í vinnuni.

Tað at 1000 fólk færri gjørdust arbeiðsleys í februar merkir, at arbeiðsloysi í Danmark er 148 túsund fólk. Hetta svarar til 5,3 prosent av arbeiðsmegini og tað er eitt prosent lægri enn fyri einum ári síðani, tá arbeiðsloysi var 6,3 prosent. Í 1993 var arbeiðsloysi 12 prosent.

Eftirlønin dregur

Jyllandsposturin skrivar, at tað serliga er millum tey ungu, at arbeiðsloysi fellur. Her er arbeiðsloysi bert 3,4 prosent, og tá arbeiðsloysi er so lágt, verður tað í Danmark mett, at øll hava arbeiði.

Tølini, sum eru frá Danmarks Statistik vísa annars, at tað serliga er eftirlønin, sum dregur fólk av arbeiðsmarknaðinum. Í februar fóru 500 fleiri av arbeiðsmarknaðinum við eftirløn og samlaða talið av donum, sum nú fær eftirløn er nú knappliga 155 túsund.

Hetta er hægsta tal, sum nakrantíð hevur fingið eftirløn í Danmark og teð er einki, sum bendir á, at talið fer at fella komandi mánaðirnar. Fyri nøkrum mánaðum síðani broytti stjórnin annars treytirnar fyri eftirlønini, men sum støðan er í løtuni ber ikki til at siga, at broytingarnar hava havt nakra ávirkan yvirhøvur.

Ósemja um bráða afturlating

Ein lærumeistari og tveir lærlingar á kjøtdeildini á Eysturoyar Heilsølu fingu sum vátan vøttin, tá ið teir frættu at deildin lat aftur. Boðini komu stutt áðrenn virksemið skuldi steðga. Burtur úr hesum er fyribils komin ein heldur fløkt søga um lærlingaviðurskifti, fakfeløg og ov vánaliga kunning

HØGNI MOHR

Einaferð var ein kjøtdeild á Eysturoyar Heilsølu.

Men fríggjadagin løgdu teir tríggir menninir á deildini knívarnar til viks fyri seinastu ferð. Og hetta var gjørt ímóti teirra vilja.

Boðini um, at deildin lat aftur, tí MBM í Hósvík skuldi taka sær av arbeiðinum í staðin, komu sambært starvsfólkunum á deildini ikki fyrr enn mánadagin í farnu viku. Tveir av teimum á kjøtdeildini á Eysturoyar Heilsølu eru lærlingar, og teir fingu boð um, at høvdu teir hug, kundu teir fara til Hósvíkar at læra seg lidnar. Teir umhugsa enn, um teir taka av óvæntaða tilboðnum.

Men søgan um afturlatingina er fløktari enn so.

Orð móti orði

Leiðarin og lærumeistarin á kjøtdeildini, Magnus í Hjøllum, er sum vera man firtin, tí leiðslan á heilsøluni eftir hansara metum hevur havt duldar ætlanir við honum og lærlingunum báðum.

- Vit fingu boðini mánadagin klokkan hálvgum ellivu, og tað var sum at fara í dans og fáa nevan, sigur Magnus í Hjøllum.

Men stjórin á Heilsøluni, Áki í Skemmuni, sigur, at Magnus í Hjøllum longu varð kunnaður tríggjar vikur frammanundan. Og tað heldur stjórin eisini vera nóg long tíð at umráða seg í. Lærumeistarin hevur fingið í boði at halda fram í øðrum starvi á heilsøluni.

Viðvíkandi lærlingunum sigur Áki í Skemmuni, at ein treyt fyri, at farast kundi undir nýggja samstarvið við MBM var, at MBM skuldi verða góðkent sum lærupláss, og síðani skuldi bjóða lærlingunum báðum á heilsøluni at læra seg lidnar í Hósvík. Hendan treytin er uppfylt.

Fær neyvan stuðul

Lærumeistarin hjá teimum báðum lærlingunum, Magnus í Hjøllum, er ikki nøgdur við viðferðina. Málið er latið Runavíkar Handverkarafelag. Men tað er verri enn so vist, at felagið fer at stuðla Magnusi í Hjøllum. Formaðurin í felagnum, Henry Olsen, sigur at Magnus í Hjøllum ikki meldaði seg sum lim í felagnum fyrr enn fyri einari viku síðani. Hetta hóast hann hevur arbeitt sum slátrari í fleiri ár.

- Eg eri púra samdur í, at viðferðin, sum teir á kjøtdeildini hava fingið, er burturvið, men eg ivist stórliga í, um handverkarafelagið fær gjørt nakað. Tað er ov seint at melda seg inn í fakfelag, tá ið trupulleikarnir longu hava tikið seg upp, sigur Henry Olsen.

Hann leggur dent á, at Runavíkar Handverkarafelag ikki ætlar sær at skapa eitt fyridømi, sum staðfestir, at tað er í lagi at melda seg ov seint inn í fakfelag.

Arbeiðsgevarin kann siga upp

Eysturoyar Heilsøla er ikki limur í Arbeiðsgevarafelagnum, og tí er tað ikki nakað beinleiðis krav, at leiðarin og lærumeistarin á kjøtdeildini skal vera limur í fakfelag.

Formaðurin í Føroya Handverkarafelag, sum lokalfelagið í Runavík hoyrir undir, eitur Poul Øregaard. Hann staðfestir, at lærumeistaranum ikki nýttist vera limur í Handverkarafelagnum. Men hann ger eisini vart við, at tað neyvan ber til at melda seg inn fyri at loysa ein trupulleika her og nú.

- Vit hava stóran áhuga í lærlingunum, sigur Poul Øregaard. Men samstundis stað-festir hann, at teirra støða ikki er serliga sterk.

- Heldur eitt lærupláss upp at, hevur arbeiðsgevarin rætt at siga lærlingunum úr starvi, heldur Poul Øregaard seg minnast frá teirri tíðini tá ið hann sjálvur var lærumeistari.



Henry Olsen, formaður í Runavíkar Handverkarafelag. Mynd: Jens Kr. Vang

Tikin við einum kilo av hassji

Tollararnir í Vágum fingu óvantaðan fong, tá teir fríggjadagin kannaðu góðsi hjá teimum ferðandi. Ein persónur varð tikin fyri at royna at smugla hassj inn í landi og síðani eru tvey fólk handtikin aftur at honum

SVEINUR TRÓNDARSON

Fríggjadagin varð eitt konufólk tikið á flogvøllinum við meiri enn einum kilo av hassji uppiásær.

Av Kriminaldeildini í Havn frætta vit, at Tollvaldið, vesturin í Vágum, tók kvinnuna í eini vanligari kanning.

Kvinnan, sum var tikin var ein 44 ára gomul donsk kvinna. Síðani eru tveir mans eisini handtiknir í málinum og leygardagin vóru tey øll trý framstillað til grundlógaravhoyring í Føroya Rætti.

Rætturin gjørdi av at fongslað tey trý til 19. apríl, ta fyrstu vikuna í isolatión.

Hetta lótu tey trý sær kortini ikki lynda og tí kærdu tey dómin inn fyri Eystara Landsrætt, sum kortini ikki hevur gjørt ein úrskurð í málinum enn.

Nøgdin - gott og væl eitt kilo - er tann størsta, sum er tikin av løgregluni í ár.

Verður nøgdin umroknað til pening, so svarar tað til góðar 100 túsund krónur. Kriminaldeildin sigur, at tann prísur teir kenna, er millum 100 og 125 krónur fyri grammi.

Menninir, sum vóru tiknir eru ein 24 ára gamal og ein 39 ára gamal.

Trý fólk eru tikin í nýggjasta hassjmálinum

Nýta orku til internetið

At verða skrásettur í leitimaskum á internetinum er ikki nakað tú bert gert einaferð med alla. Hetta krevur arbeiði, og tí mugu fyritøkurnar verða til reiðar at seta tíð og orku av til hetta arbeiði, skrivar Vinnuhúsið.

Tað er ikki heilt óvanligt úti í heimi, at fyritøkur seta aðrar fyritøkur ella fólk uttanífrá at taka sær av, at júst teirra heimasíða verður plasera millum tær fyrstu ella tær best umtóktu á leitimaskinunum. Leitimaskinurnar eru eins og restin av internetinum í støðugari broyting, og hetta merkir, at fyritøkurnar ikki kunnu seta seg afturá, tá tær eru skrásettar eina ferð á leitimaskinunum.

Skrásetingin skal javnan endurskoðast og broytast fyri ikki at enda niðast á listanum við leitiúrslitum.

Hugsa um leitivanar

Áðrenn tú yvirhøvur leggur heimasíðuna út á leitimaskinua eigur ein at gera sær hugsanir um móttakarabólkin av heimasíðuni, so sum hvørjar leitivanar hevur móttakarbólkurin. Út frá hesum er møguleiki at finna ta røttu leitimaskinuna til ætlaða móttakarabólkin, og skræddaraseyma heimasíðuna til rætta bólkin.

Í U.S.A. nýta nógvar fyritøkur umleið 50% av marknaðarføringsútreiðslunum til at útvega sær eitt gott pláss í einari leitimaskinu.

»Vit fara at síggja sama tendens her heima um fá ár, av tí at Internetið verður eitt týðandi konkurrenceparameter í framtíðini«, sigur Tina Donnerborg, marknaðarstjóri í Dansk Industri, við blaðið Industrien.

Hvirla tók lastatakið

SVEINUR TRÓNDARSON

Verðið hevur ikki verið av tí besta um vikuskiftið, hóast tað ikki hevur verið ódnarveður. Fríggjadagin var ein bilur hjá P/F Poul Hansen á veg úr Vági til Tvøroyri, tá ein hvirla brádliga skræddi takið av lastini á bilinum.

– Vit vóru komnir norður um Porkeri, á leið við rulluportrið, á veg oman móti Hovi, tá ein hvirla kom. Hon var ikki serliga hørð, men onkusvegna hevur hon fingið fatur á takinum á lastini, tí áðrenn vit vistu, lá tað við síðuna av vegnum, sigur ein teirra, sum var við.

Hann greiðir frá, at teir hildu, at teir høvdu koyrt á ein stein, sum tað rykti í bilin, men tá teir hugdu afturum, sóðu teir, at takið var fokið av.

– Tað hevur mangan verið neyðugt at halda sær, tá mann koyrir har um vegir, men henda dagin var ikki so óvguligt, sigur hann.

Maðurin sigur, at takið á lastini var úr glasfipuri og var fest við aluminiumsrammu, og tað heila fór, sum tað var.

– Har sást beint upp í himmalin. Ramma og alt feyk omanav og niðan í bøin. Vit fóru út og løgdu eitt sindur av gróti omanyvir, so tað ikki fór í vindinum og síðani vippaði ein lastbilur eitt sindur av sandi niðuryvir.

Eingin fólkaskaði stóðst av óhappinum.

Patrónir og rúsdrekka umborð á Arctic Viking

Hósdagin vóru tollararnir umborð á Arctic Viking og har funnu teir ólógligar rifflupatrónir og rúsdrekka. Reiðarríið hevur goldið uml. 100 túsund krónur í bót

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað er freistandi. Tað er verri enn so altíð at teir klára at lata vera, men vera teir tiknir, so fellur hamarin.

Vit tosa um ólógligan innflutning av rúsdrekka og, í hesum førinum, av lóðuri.

Tollvaldið var hósdagin umborð á rækjutrolaranum Arctic Viking í sambandi við, at hann var komin aftur til Føroya.

Sum so ofta er, verður keypt í so ríkiligt av tí váta slagnum og hósdagin funnu tollararnir uml. 200 litrar av rúsdrekka, sum lá goymt umborð.

Men tað var ikki tað einasta. Tí umframt rúsdrekka fann løgreglan eisini eina rúgvu av ólógligum rifflupatrónum.

Fyri at kunna innflyta slíkt er neyðugt at hava rifflulоyvi og tey eru ikki so mong, sum hava slík.

Av løgreglustøðini í Havn frætta vit, at loyvi verða givin í einstøkum førum, men sum oftast er talan um alibrúk, sum brúka rifflurnar til at avlíva kópar, sum gerast ov næskir.

– Onnur fáa ikki brúksloyvi, tí tað er næstan ikki loyvt at brúka rifflur. Onkur hevur loyvið at eiga rifflu, men tey hava ikki loyvi at brúka tær, sigur Tórmóður Mouritsen av løgreglustøðini í Havn.

Hóast góða fongin hósdagin, fóru tollararnir umborð aftur fríggjadagin og tá funnu teir enn fleiri rifflupatrónir, sum teir eisini løgdu hald á.

Sosialurin skilir, at reiðarríið hjá Arctic Viking hevur bøtt fyri skaðan við eini bót upp á umleið 100 túsund krónur.